# FHS

## Fyrisiting, Handil og Skrivstova

FHS er ein útbúgving, ið tekur eitt ár. Fyri at verða tikin upp á FHS-útbúgvingina krevst, at tú hevur lokið 9. flokk (ella hevur samsvarandi kunnleikastøði).

FHS er ein støðisútbúgving, sum skal geva tær eina grundleggjandi vitan, sum kann nýtast, um tú fert undir eina 3 ára skrivstovu- ella handilsútbúgving.

FHS-prógv er eisini ein fortreyt fyri at fara undir eina 2 ára HH-útbúgving. Um tú ætlar at halda fram á HH, so er tað eitt krav, at tú hevur staðið støddfrøði á C-stigi ella 2. fremmandamál (t.d. týskt) á C-stigi í FHS.

Tað er ikki eitt krav, at tú alt fyri eitt heldur fram í HH eftir FHS-støðisárið. Næmingar hava viðhvørt ein steðg í eitt (ella nøkur ár) fyri at vinna pening, ferðast, búnast ella okkurt annað.

**Hvat kann eg brúka FHS til?**

- Lesa víðari á Hægri Handilsskúla (HH)
- Fara í læru á skrivstovu ella í handli
- Fara í arbeiði

**Lærugreinir**

Í FHS eru grundlærugreinirnar 910 tímar um árið. Tú skalt harafturat velja vallærugreinir og/ella økislærugreinir, so at árliga tímatalið hjá tær verður umleið 1.200 tímar. Hetta er um 34 tímar um vikuna.

Fleiri av lærugreinunum kennir tú frá fólkaskúlanum so sum føroyskt, enskt, týskt og støddfrøði. Tó eru lærugreinirnar á einum hægri støði enn í fólkaskúlanum. Aðrar lærugreinir kennir tú kanska ikki, t.d. virkisbúskap og marknaðarførslu.

Í virkisbúskapi lærir tú um grundleggjandi virkisbúskaparlig hugtøk, mannagongdir og arbeiðshættir innan bókhald; t.d. at gera bókingar, at seta einfaldar roknskapir upp og at greina roknskapir og annað.

Í marknaðarførslu fært tú grundleggjandi kunnleika til marknaðarviðurskifti og samspælið millum fyritøku og brúkara. Lært verður um brúkaraviðurskifti, kappingarviðurskifti, málbólkar, marknaðarførslu, marknaðarkanningar, lóggávu og sølu-, keyps- og goymslustýring.

Vend



Í FHS er eisini møguleiki at velja vallærugreinir (uml. 290 tímar). Vallærugreinirnar eru Týskt, Spanskt, Støddfrøði, Dekoratión og Íverksetan.

Dekoratión og Íverksetan eru lærugreinir har næmingurin m.a. fær høvi at royna síni kreativu evni. Í Dekoratión er m.a. uppseting av handilsvindeyga og litlæra á skránni. Í Íverkasetan verður m.a. arbeitt við at menna eitt vøruhugskot og tilrættarleggjan framleiðslu, fíggjarætlan og marknaðarføring av hugskotinum.



